**Tankar av tingi:**
**Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður**

# Landsstýrismaðurin ger sum hann vil

Ólavsøkudag í 1994 kom nýggja stýrisskipanarlógin í gildi. Reglan um ráðharrastýri og ráðharraábyrgd kom tó ikki í gildi fyrr enn eitt ár seinni. Sostatt hava vit nú livað við galdandi stýrisskipanarlóg í meira enn átta ár. Galdandi stýrisskipanarlóg setur greiðan skilna ímillum lóggávuvaldið, útinnandi valdið og dómsvaldið.

Undir gomlu stýrisskipanarlógini var alt ein vavstur. Í so at siga øllum lógaruppskotum tryggjaði landsstýrið sær heimild við kunngerð at áseta nærri reglur. Útinnandi valdið var á nógvum økjum hjá landsstýrinum saman við og ávísum løgtingsnevndum. Á fíggjarliga økinum kundi landsstýrið tryggja sær játtan saman við løgtingsins fíggjarnevnd. Á fiskivinnuøkinum hevði landsstýrið ávísar heimildir saman við løgtingsins fiskivinnunevnd. Og í uttanlandsspurningum kundi landsstýrið bæði eitt og annað saman við løgtingsins marknaðarnevnd.

Tað vil siga, at landsstýrið saman við ávísum løgtingsnevndum, hevði ein ávísan part av lóggávuvaldinum, meðan løgtingið umvegis hesar ávísu tingnevndirnar, hevði ein munandi part av útinnandi valdinum og umsitingarvaldinum. Tað var ikki tann einstaki lndsstýrismaðurin, ið hevði ávísar heimildir saman við ávísari løgtingsnevnd, men tað var samlaða landsstýrið ella ein meiriluti í landsstýrinum, sum hevði hesar ávísu heimildirnar, saman við í minsta lagið einum meiriluta í viðkomandi løgtingsnevnd.

Við galdandi stýrisskipanarlóg skuldu vit gera upp við henda vavgreytin. Hereftir skuldu lógávuvald ikki longur liggja hjá landsstýrinum og ávísum løgtingsnevndum. Nú skuldi lóggávuvaldið liggja hjá løgtinginum og útinnandi valdið og umsitingin skuldu liggja hjá landsstýrinum. Eftir meira enn átta ár við galdandi stýrisskipanarlóg, kunnu vit so spyrja, hvussu tað hevur gingið og hvussu støðan er, ella hvussu greiður skilnaðurin nú er millum lóggávuvaldið øðrumegin og útinnandi valdið hinumegin?

Taka vit t.d. lógina um vinnuligan fiskiskap, so hava vit eitt talandi dømi um, at skilnaðurin als ikki er so greiður, sum ætlanin var við galdandi stýrisskipanarlóg. Orðini, „Landsstýrið (les landsstýrismaðurin) hevur heimild at áseta nærri reglur

við kunngerð", koma so ofta fyri, at lóggávuvaldið í veruleikanum ikki er hjá løgtinginum, men hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum. Eg havi áður víst á, at undantøkini í lógini um vinnuligan fiskiskap, har landsstýrismaðurin fær heimild á áseta nærri reglur við kunngerð, eru so nógv í tali og so týdningarmikil, at vit kunnu samanskriva lógina til fimm orð. Nevniliga: „Landsstýrismaðurin ger sum hann vil".

Taka vit økisfriðingarnar so hevur landsstýrismaðurin heimild við kunngerð at áseta hesar friðingar. Hann kann friða allar havleiðirnar við Føroyar, um hann hevur hug til tað, og hann kann eisini lata vera við at friða nakað øki yvirhøvur. Økisfriðingarnar av gýtingarleiðunum skuldu sjálvandi verið lógfestar. Øll vita, at t.d. toskurin ár um ár um ár gýtir um somu tíð og á somu leiðum, tí er tað sjálvsagt, at bæði leiðirnar, ið verða friðaðar vegna gýting og tíðarskeiðini, sum hendan friðing fevnir um, verða lógfest. Nakað annað er bráfeingis friðingar, ið neyðugar eru at kunngerð vegna tess, at ov nógvur smáfiskur er á eini leið. Her má landsstýrismaðurin ella Fiskiveiðueftirlitið hava neyðugu heimildina.

Ein treyt fyri, at galdandi stýrisskipanarlóg skal virka eftir ætlan, soleiðis at greiður skilnaður verður millum lóggávuvaldið og útinnandi valdið, er, at løgtingið lóggevur neyvari ella meira ítøkiliga. Tað eigur næstan ikki at koma fyri, at landsstýrismenninir fáa heimild við kunngerð at áseta nærri reglur, tí hvørja ferð hetta hendir, gevur løgtingið lóggávuvald frá sær og letur hetta upp í hendurnar á teim einstøku landsstýrismonnum og teirra umsiting.

Her nyttar lítið hvat andstøðan á tingi sigur. Tað eru samgonguumboðini, sum eiga at sláa nevan í borðið og krevja, at lógaruppskotini verða neyvari og meira ítøkilig, soleiðis at landsstýrismenninir og aðalstýrini ikki framhaldandi sleppa at stjala ein munandi part av lóggávuvaldinum frá løgtinginum.